# Gávur ið muna

**Rivini eru røst, karamelludósirnar settar undir væðingina og gávulistin er drúgvari enn nakrantíð. Meðan skuffur og hillar verða ruddaðar at geva pláss fyri fleiri tingum, rennur mær til hugs tey mongu her í heimi, sum høvdu fegnast um ein mola av okkara borði. Reyði Krossur lýsir í hesum døgum við jólagávuhugskotum, sum gera mun. Hetta eru gávubrøv, sum eru prógv um, at tú hevur rindað ávísa upphædd til vatnveiting, mikrolán, neyðhjálp ella skúlagongd til menningarlondini. Gávubrævið verður sent tær pent innpakkað, og klárt at geva onkrum í jólagávu. Og knappliga gevur jólagávuresið meining, ikki bara fyri teg, men eisini fyri eitt annað menniskja hinumegin jørðina. Jólini eru altíð tey somu, og so skal vera. Men í ár kunnu tey kortini gerast eitt lítið sindur øðrvísi.**

**JÓLARÁKIÐ 2007**
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**Fo-110 Tórshavn**
**post@sosialurin.fo**
**www.sosialurin.fo**

**REDAKTØRUR**
**Rigmor Dam**
**Rigmor@sosialurin.fo**

**BLAÐFÓLK**
**Eydna Skaale**
**Dorit Hansen**
**Inna Törnroos**
**Anna Ellingsgaard**
**Rigmor Dam**

**LÝSINGAR**
**Gudny Langaard**
**Joan Abrahamsen**
**Henrietta Hammer**

**MYNDIR**
**Álvur Haraldsen**
**Jens Kristian Vang**
**Sunva Eysturoy Lassen**

**ÚTGEVARI**
**Sp/f Sosialurin**

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*

## List og luksus

Á innrættingarøkinum spáa rákfrøðingar, at fólk verða alsamt djarvari. Tey fara í nógv størri mun at tora at gera dreymarnar til veruleika, eitt nú við meira luksus og list í heiminum.



## Leita og tú finnur



Ein amerikansk kanning hevur víst, at kvinnur brúka í miðal 55,2 minuttir um dagin til at leita eftir tingum. Tí valdu tær báðar donsku Suzanne Potts og Charlotte Mensen at seta á stovn konseptfyritøkuna Nomess, sum hevur til endamáls at sniðgeva og selja lekrar vørur, sum skulu fáa skil á óruddinum í heiminum. Nomess hevur millum annað lekkur stórbýarkend gardarobustativ og smartar klárar eskjur at goyma skógvar, greiðir, klæðir og alt møguligt annað í. Eskjurnar fáast í øllum støddum, og kunnu setast saman við einum klikki. Vørurnar frá Nomess eru at fáa í Magasin í Danmark og í Inventartænastuni í Havn, sum eisini selur til privatkundar.



## Smílandi skálin

Eva Solo Smiley vann virðislønina Formland Design Award – Autumn 2007. Claus Jensen og Henrik Holbæk frá sniðgevaravirkinum Tools hava sniðgivið skálina.

## MUHHH...

Hesi fitti og litføgru gips-neytini, sum eisini eru pengabússur, eru at fáa hjá Li-Wi í Streymnesi. 69 kr. fyri kúnna og 34 kr. fyri kálvin.



## Krimi og klókskapur






**Vísdómsorð Dalai Lama**
Om selvindsigt 184 kr.
Om tro og viden 92 kr.
Om kærlighed 92 kr.

**Fantastiskar krimiir eftir Stieg Larsson**
Luftkastellet ber blev sprængt 275 kr.
Pigen der legede med ilden 276 kr.
Mænd der hader kvinder 119 kr.